# Kamping í Húsavík

Alt fleiri føroyingar og ferðandi í Føroyum velja kampinglívið, og tey fáa eisini fleiri møguleikar. Nú hevur Húsavíkar Kommuna gjørt økið sunnan fyri Ungmannahúsið Sólarris klárt til vitjandi við kampingvogni. Á økinum er øll tann neyðuga útgerðin sum streymur, vatn o.a., ið krevst til endamálið. Kostnaðurin fyri at brúka kampingplássið í Húsavík er 100 kr. um dagin fyri vognin. Tey, sum ætla sær at kampera í Húsavík, kunnu ringja til Honnu Sørensen tel. 361417 ella 266417.



# Veiðuvirðið minkar

Hóast íslendsk skip landaðu fyri meiri pengar í apríl í ár enn í apríl í fjør, so var veiðuvirðið fyra teir fyrstu mánaðirnar í ár minni enn í somu mánaðum í fjør. Ein uppgerð vísir, at frá 1. januar til 30. apríl í ár avreiddu íslendsk fiskiskip fyri 30,6 milliardir íslendskar krónur ímóti 32,7 milliardum krónum í sama tíðarskeiði í fjør. Minkingin svarar til 6,5 prosent. Tølini vísa, at avreiðingarvirðið á toski og upsa minkaði, meðan meiri fekst fyri hýsuna.



# San

STEVNA

*Orð og myndir: Sólvit Nolsøe*

Vit vórðu í Húsavík leygardagin, har Sandoyarstevnan 2008 var hildin.

Í fínasta veðri bleiv stevnan sett kl. 14. Setanarrøðuna helt Vanja Engskær.

Fitt av fólkið var komi saman henda leygardag, at gera sær dælt av øllum møguligum slag av undirhaldi, ið stevnan hevði at bjóða.

Tað var nógv at fara til, bæði til børn, ung og gomul og allir aldursbólkar høvdu eisini leita sær oman til stevnuøkið, ið var á økinum rundanum bygdahúsið Sólarris. Eisini bleiv sjálvvt húsið nýtt til matstovu, har kokkurin Ansgar Nolsøe borðreiddi við góðum matið.

Ein av fyriskiparunum, Kári Sørensen, lat væl at stevnuni: „Nú er sjálvandi ov skjótt at siga nakað, tí endaliga úrslitið kann ikki síggjast fyrrenn sunnukvøldið tá stevnan er av, men higartil eru vit vælnøgd". Kári sigur, at tey í ár hava roynt at hava eitt sindur øðrvísið tiltøk enn bara tey, ið fólk eru von við. „Vit hava pony ríðing, konsertir, ein gongutúr runt bygdina við staðkendum manni og eisini hava vit eina matstovu, ið serverar góðan mat". Kári Sørensen segði víðari, at alt hevði gingið eftir ætlan og væntandi fór alt at ganga sum tey ætlaðu. „Veðri hevur tó alt at siga tá samanum kemur" sigur Kári Sørensen at enda. Fólk, sum Sosialurin tosaði við vórðu vælnøgd við Sandoyarstevnuna, sum hevði nógv at bjóða til øll.

Av tiltøkum, ið vórðu kunnu nevnast úr rúgvuni, konsert við Guðrið Hansdóttir, Hanus G. Johansen, Fríðbjørg Jensen og Martin Jonsen. Gongutúrur í Húsavík við Hanus undir Leitinum og mynda- og tekninga framvísing í skúlanum, har Frída Eystberg Johannusen og Silja Wendelboe vístu fram.



*Vakurt er í Húsavík*